# Eitt sindur stuttligari hjá Rúna

**Fínteljingin eftir fólkatingsvalið broytti ikki endaliga úrslitið. Men okkurt valevni misti atvøður, meðan onkur tvífaldaði atkvøðurnar. – At eg bara fekk 20 atkvøður taki eg sum eina álitisváttan, sigur eitt av valevnunum, Rúni Ellingsgaard**

VALÚRSLIT

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Tey telja atkvøðurnar frá fólkatingsvalinum. Sjálvt úrslitið broyttist tó ikki, men onkrar atkvøður vórðu kortini fluttar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ein sum ikki var so fegin eftir fólkatingsvalið var annað valevnið hjá Hinum Stuttliga Uttanflokkalistanum.

Við valið fekk Rúni Ellingsgaard einans 9 atkvøður. Tað var ikki so mikið, men nú fínteljingin av atkvøðunum hevur verið, man tað kennast eitt sindur stuttligari hjá honum.

Við hesa teljing fekk hann ikki færri enn 11 atkvøður aftrat, og endaði sostatt uppi á 20. Her varð talan um meiri enn eina tvífalding av atkvøðunum. Hetta var kortini ikki nóg mikið til at hann varð valdur!

- Tað var tó ein øgilig framgongd, sum eg knappliga fekk. Eg segði annars við tey á Posthúsinum, at um tey vildu sleppa av við meg, so skuldu tey bara velja meg. Tað hava tey so ikki gjørt, so tí haldi eg fram har.

– Annars so taki eg hetta sum eina álitisváttan, tí so fá arkvøddu fyri mær ...! Tað gjørdi løgmaður so í øllum førum, og tí sigi eg bara tað sama sum hann, sigur ein fegin Rúni Ellingsgaard í stuttari viðmerking við Sosialin, nú úrslitið av fínteljingini er greitt.

Annars misti fyrstvaldi fólkatingsmaður, Annfinn Kallsberg seks atkvøður. Og nú eru bert 17 atkvøður millum tvey av høvuðsvalevnunum hjá javnaðarflokkinum, Helenu og John.

## Hamari og sigli

Allan týsdagin sótu fólk á Hotel Hafnia fyri at fíntelja atkvøðurnar frá fólkatingsvalinum. Tá tað leið móti kl. 23 var arbeiðið liðugt.

Úrslitið vísti ikki tey stóru útsvingini í mun til sjálvt valið. Onkutíð hevur tó verið rættiliga tætt ímillum valevnini, og tá hevur við spenningi verið bíðað eftir fínteljingini.

Hesaferð var tó eingin ivi um, hvør varð valdur. Annfinn Kallsberg misti seks atkvøður og fekk íalt 3.270 atkvøður, meðan Høgni Hoydal misti eina og kom niður á 2.798 atkvøður. Johan í Kollafirði misti átta atkvøður, meðan Edmund Joensen og Kaj Leo Johannesen fingu ávikavist tríggjar og fýra atkvøður aftrat.

Fyri flokkarnar varð tó talan um smávegis broytingar. Fínteljingin gav soleiðis fólkaflokkinum 5.967, sambandsflokkinum 5.333, javnaðarflokkinum 5.518, sjálvstýrisflokkinum 585, tjóðveldisflokkinum 6.301, miðflokkinum 829, Johan í Kollafirði 289 og Rúna Ellingsgaard 20 atkvøður.

Valrætt høvdu 34.166 fólk. Av hesum brúktu 24.842 henda rættin, og svarar hetta til 72,71 % av veljarum.

Annars vóru nógvar vanligar atkvøður og eisini fleiri brævatkvøður, ið ikki vórðu góðkendar á valinum. Íalt vórðu 94 atkvøður dømdar ógyldigar, tí tær t.d. vóru blankar ella tí frámerki varð sett á.

Sjónvarpið vísti valkvøldið dømi um nakrar av ógyldigu atkvøðunum. Onkur vinstrasinnaður hevur helst verið teirra millum teir veljararnar, sum saknaði okkurt líkasinnað valevni. Tí á eina atkvøðuseðlinum hevði onkur teknað hamara og sigli.

### Atkvøðutal hjá nøkrum valevnum

| | Endaligt úrslit | Fólkatingsvalið |
|---|---|---|
| Anfinn Kallsberg | 3.270 | 3.276 |
| Høgni Hoydal | 2.798 | 2.799 |
| Edmund Joensen | 1.313 | 1.310 |
| Jóannes Eidesgaard | 1.183 | 1.183 |
| Kaj Leo Johannesen | 1.133 | 1.129 |
| Helena D. á Neystabø | 1.119 | 1.119 |
| John Johannesen | 1.102 | 1.100 |
| Tobbi Jacobsen | 1.080 | 1.081 |
| Óli Breckman | 998 | 995 |

# Nýggj inngongd til Havnar

**Arbeiðið við at gera tann nýggja innkomuvegin gongur væl. Enn er trupult at siga, nær tað verður liðugt**

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Arbeiðið viðnýggju inngongdina til høvuðsstaðin nærkast nú teimum ovastu húsunum*

– At verða ein avlasting fyri Hvítanesvegin.

Tað er í øllum førum ætlanin við hesum nýggja innkomuvegnum til Havnar, sum arbeitt verður uppá í løtuni.

Arbeiðið gongur væl, men enn ber illa til at siga við vissu um, nær tað verður liðugt, skrivar heimasíðan hjá Landsverki.

– Tað veldst alt um tær játtanir, sum verða á komandi fíggjarlógum, verður sagt.

Kostnaðurin av arbeiðinum er mettur til 84 mió. kr. Tað er samtakið Tórhallur Hansen og Zacharias Jakobsen, ið standa fyri arbeiðinum.

## Nógv ferðslan

Tað man vera uppá hægstu tíð, at ein nú er farin undir at lætta um innkoyringina til Havnar.

Ein teljing av ferðsluni, sum varð gjørd í 2003 vísir, at nærum 8000 bilar koyra eftir hesum vegastrekkinum um dagin. Og neyvan er talið av bilum minkað síðani tá.

Júst fyri at avlasta verandi innkomuveg – Hvítanesvegin - er ein tí farin undir at leggja henda nýggja innkomuvegin til Havnar. Hesin verður gjørdur frá landsvegnum undir Skarðshjalla, millum Hvítanes og Sund, har hann síðani gongur vestur til Oyggjarvegin.

Og arbeiðið hevur gingið væl. Fyrr í hesum mánaðinum høvdu teir gjørt um 650 metrar av grovplaneraðum vegi frá staðnum, har randarhúsini Millum Gilja eru, og vestur ímóti Sundsvegnum, og hetta arbeiði heldur áfram.

Ætlanin var, at vegurin skuldi ganga norður á Skarðshjalla og síðani fara í vegin, sum gongur inn í Kaldbaksbotn. Men henda ætlan verður helst broytt soleiðis, at vegurin verður lagdur oman móti Klingruni og síðani norðureftir. Her verður hann bundin í vegin inn móti Kaldbaksbotni, áleiðis har bindingin inn á ídnaðarøkið á Sandvíkahjalla er.

Samlaða projektið fyri vegin, frá bindingini inn á ídnaðarøki á Sandvíkahjalla og vestur til bindingina við Oyggjarvegin, er um at vera liðugt.

Upplýst verður, at annar partur av 1. byggistigi verður liðugur í ár. Men sum nevnt veldst alt um játtanirnar á fíggjarlógini, nær tað endaliga arbeiðið verður liðugt.

## 22 legur á Vatnsoyrum

**Leguvirksemi:** Aftur í ár fer leguhúsið Zarepta á Vatnsoyrum at lata dyrnar upp fyri einum hópi av legum.

Talan er um mong ymisk sløg av legum – bæði fyri ung, eldri, familjur, hjún og einlig. Umframt hetta verður eisini ein serstøk stevna fyri menn og ein fyri kvinnur á skránni í summarhálvuni.

Tær fyrstu legurnar byrja í apríl mánaði, tá ein lega sum er ætlað teimum brekaðu er á skránni. Henda byrjar 21. apríl og endar 24. apríl.

Síðani verður hildið á við íalt 22 legum fram til oktober mánað, tá heystlegan fyri tey 14 til 17 ára gomlu verður á skránni.

Ein fullfíggjað ætlan fyri allar legurnar varð kunngjørd í farnu viku. Sagt verður, at ein seinni fer at boða frá, nær tekningin til hesar legurnar skal gerast.

Hvørt einasta ár plaga í túsundatali av fólkum at leita sær á Zarepta, ið liggur í sera náttúruvøkrum umhvørvi.

sb.

## 13.000 fremmand tons undir Føroyum

**Fiskiveiða:** Ein uppgerð yvir útlendsku veiðuna í okkara sjóøki vísir, at í januar mánaði fiskaðu útlendsk fiskifør íalt 13.217,1 tons. Samanlagt varð talan um 770 fiskidagar.

Av hesum áttu russar meginpartin, tí teir henda mánaðin fiskaðu 11.450 tons av svartkjafti hjá okkum.

Yvirlitið vísir, at norðmenn veiddu næstmest í okkara sjóøki. Í farna mánaði fiskaðu norsk skip m.a. 679 tons av brosmu, 643 tons av longu, 125 tons av toski og 119 tons av hýsu.

Skip úr ES-londun-um hava eisini fiskað her, og er tað serliga fronsk skip sum hava verið til fiskiskap í farna mánaði. Fronsk skip veiddu hetta tíðarskeiðið 47 tons av blálongu, sløk 40 tons av langasporli og 17 tons av øðrum fiskasløgum.

Annars vísir yvirlitið, at einki varð fiskað av sild, makreli, rossamakreli og prikkafiski. Í januar varð heldur eingin brugdulivur tikin.

Tað eru serliga bretsk, fronsk, norsk og russisk fiskiskip sum hava roynt í okkara sjóøki hetta tíðarskeiðið. Samstundis hevur einki skip úr Hollandi, Danmark, Týsklandi, Írlandi, Estlandi, Japan, Grønlandi ella Íslandi verið her.

sb.